Ung í Føroyum 2010:

# – Bert hugflogið setur markið









**Stevnan har tey ungu kreativu hittast verður nú aftur! Tann 26. til 28. februar letur Norðurlandahúsið hurðarnar upp fyri 60 ungum í Føroyum, sum tora og duga og vilja. Øll sum eru 13 ár, men enn ikki 19 kunnu tekna seg innan tann 29. januar. 9. januar lat tekningin upp á www. ungiforoyum.info!**

TÍÐINDASKRIV

Tann 26. februar fer 10. UíF-stevnan av bakkastokki, tann sætta í Norðurlandahúsinum.

Hetta er stevnan, har øll ung í landinum, sum hava listarlig áhugamál ella fáast við eitthvørt, ið hevur við list at gera, kunnu koma og hitta onnur, sum hava somu áhugamál og læra nýtt av hvørjum øðrum og av kendum føroyskum og útlendskum listafólkum.

Tað er her, at ung kunnu vísa øllum, hvat ungdómsmentan er, tá ung sjálvi seta dagsskránna.

## Fyri øll kreativ ung

Ung í Føroyum er fyri øll ung, sum eru listarliga áhugaði, bæði til tey, sum hava nógvar royndir, til tey, sum akkurát eru byrjaði, ella til tey, sum bara hava hug at fara í gongd við nakað listarligt.

Tey kunnu royna nýggjar leiðir og mennast innan sítt listaøki, men tað ber eisini til at royna okkurt annað enn tað, tey fáast við til dagligt.

Her kunnu ung hitta onnur, sum fáast vit tað saman sum tey, hitta javnlíkar og eisini síggja, at alt ber til – bert hugflogið setur markið.

## Hvat er á skránni?

Fríggjakvøldið verður listaframsýning og sýning av teimum tónleika-, sjónleika- dansi- ella filmsverkunum og øðrum, tey ungu sjálvi hava fyrireikað frammanundan.

Leygardagin verður arbeitt í verksmiðjum allan dagin. Á kvøldi er hugnakvøld og opin pallur.

Sunnudagin verður stóra endasýningina fyrireikað, og sunnudag seinnapart kunnu øll fólk koma at síggja, hvat er avrikað.

## Kapping?

Ung í Føroyum er ikki ein kapping. Tað er ein møguleiki at vísa fram, royna nýtt, menna, tað tey duga og arbeiða saman við øðrum listarliga áhugaðum og virknum í sínum aldri. Og tað er ein møguleiki at vísa umheiminum, hvat ung list er í dag, hvat tey halda vera spennandi og viðkomandi.

Ung í Føroyum er ein týðandi sýnisgluggi fyri føroyska ungdómslist. Tað er hent og kann henda aftur, at onkur sær eina spennandi sýning ella eitt spennandi listaverk og vil nýta tað, og okkurt av tí, sum hevur verið framleitt á stevnuni, hevur verið sýnt í øðrum høpum. Eisini hava luttakarar verið bodnir at taka lut í líknandi norðurlendskum tiltøkum.

## Hvørji eru verksmiðjuleiðararnir?

Verksmiðjuleiðararnir eru øll yrkislistafólk, fólk, sum liva av sín list. Tey flestu eru føroyingar, men onkuntíð eru listafólk boðin aðrastaðni frá. Roynt verður at finna listafólk, sum ikki vanliga undirvísa í Føroyum.

Í ár vera tey hesi: Lena Andersen og Niclas Johannesen, tónleikur, Janus á Húsagarði, myndlist, Joël Colas, sirkus, Petur Pólson, skriving, Katrina í Geil, design, Vígdis Hentze Olsen, dans og Bernharður Wilkinson, samskipar sunnudagssýningina.

## UíF á Facebook

Afturat heimasíðuni, sum Ung í Føroyum hevur havt síðani 2005, hevur stevnan eisini sín egna Facebook-fjepparabólk.

Allar upplýsingar um UíF eru at finna á www. ungiforoyum.info og á www.nlh.fo.


## Havstovan søkir eftir maskinmeistara



**Søkt verður eftir einum maskinmeistara til Magnus Heinason at byrja 1. mars 2010.**

**Lýsing av Magnus Heinason**
R/S Magnus Heinason
Tórshavn, TN 407, OW 2252,
bygdur í Tomrefjord, Noreg í 1978

Skipaslag: Havrannsóknarskip

Klassi: DNV*1A1, ICE-C

Longd (LOA): 44,50 m
Breidd: 9,52 m
Djúpd: 7,15 m

BRT: 669
Høvuðsmotorur: 1800 HK M.A.K.
Ravmagn: 3x380/220 V AC.
2xMTU, 288 KVA, 1500 rpm.

Útgerð:
Botn- og flótitrol
Ekkolodd, EK-500
Asdic
Plankton net
CTD við rosettu, fluorometri og ADCP
GPS og DGPS
Arpa-radara
Satelittsamband

**Førleikakrøv**
- *Mininum vinnubræv sum maskinistur á 1. stigi*
- *Heilsuprógv*
- *Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð*
- *Roykkavari*
- *Góðan røkjuskap*
- *Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva*

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**Havstovan**
**Nóatún 1**
**P.O. Box 3051**
**FO-110 Tórshavn**

og skulu vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi 25. januar 2010.

Nærri upplýsingar um starvið kunn fáast við at venda sær til Erling í Liða, reiðara, á tlf. 35 39 00 ella e-post: erlingl@hav.fo

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo